TILTØK

Ebenezer
Í kvøld kl. 20 byrja ungdómssamfelagsmøtini. Kl. 22 verður opið hús.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 20 møtirøðin í læraraskúlahøllini byrjar – Karisma, í morgin kl. 17 landsbøn, kl. 20 møtirøð í læraraskúlahøllini – Karisma. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Símun Absalonsen, kl. 18 møtirøð í læraraskúlahøllini – Karisma.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið í Havn
Fríggjakvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið. Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Hans Eiler Hammer.
Innsavnan til ytrimissión, barnaansing er meðan møti er.
Mánakvøldið kl. 19 verður LU-arbeiðið. Filmur: I skyggen af korset (1. partur) kl. 20 venur Manskórið.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. (barnaklubbi).
Onki ungdómsmøti í Rhema leygarkvøldið vegna karisma møti í Læraraskúlahøllini um vikuskiftið – fríggja- og leygarkvøldið kl. 20, sunnukvøldið kl. 18. Øll eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.

Frelsunarherurin í Tórshavn
Vitjan av kommandørunum Berit og B. Donald Ødegaard, leiðarar fyri Noreg, Ísland og Føroyar frá 16. til 18. mars. Major Knut Gamst luttekur.
Fríggjadagin kl. 20 møti. Leygardagin kl. 20 møti. Sunnudagin kl. 11 møti, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, sjónvarpsupptøka.
Mánadagin kl. 17 skótar.

Havnar kirkja
Eystankórið við Símuni Nónklett hevur matiné (tónleikaløtu) í Dómkirkjuni leygardagin 17. mars kl. 11.30.

»Tíð til Gud«
verður í Pállstovu í Havn sunnukvøldið kl. 21. Hesuferð verður fríður vitnisburður. Dánjal av Rana og Jógvan Skýlindal skipa fyri.

Evangel. møti í Royndarhúsinum í Nólsoy
Leygardagin kl. 15 barnamøti, kl. 20 evangel. møti. Sunnudagin kl. 14 barnamøti og evangel. møti kl. 16 við Tórmund, Jaspur og fleiri.

Hvalvíkar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Mourits Mouritsen o.ø. Meinigheitskórið í Havn syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Filadelfia, Sundalagi
Sunnudagin kl. 18 kvøldmøti við Sam Jakobsen. Mikudagin frá kl. 19-21 Miðdepilin, eitt trivnaðarstað fyri ung.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin onki møti vegna møtirøðina undir heitinum »Eitt í Kristusi« í læraraskúlahøllini.
Fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Mánadagin kl. 20 bønarmøti í Saron.

Skála meinigheitshús
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20. Evnið verður: »Hvat er synd?«. Aftaná fara vit við bilum út til Runavíkar á Gospel konsert. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Jastrid og Paula Høj. Karisma møtirøðin verður í læraraskúlanum í Havn fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18.

Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við Martin Olsen, Rituvík. Húsmøti verður í Søldafirði týsdagin kl. 19 hjá Maybritt og Trúgva. Verið hjartaliga vælkomin.

Bíbliuskeiðrøðin
yvir evni hin sanni lærisveinurin verður hildin í hølum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará. Møtiskeiðrøðin heldur áfram hvønn mánadag kl. 19. Stigtakari og bíbillærari er David Bech.

Missiónshúsið í Leirvík
Í kvøld verður ungdómsmøti við luttøku úr Klaksvík. Byrja verður kl. 19 við grýturætti. Kl. 22 koyra bussar í samband við kosertina í høllini í Runavík (sigið frá áðrenn). Sunnukvøldið kl. 18 møti, har ung úr Leirvík skipa fyri, Reimund Langgaard talar. Øll eru vælkomin.

Lívsins Orð
Barnamøti verður í dag kl. 17.30.
Sunnumorgunin kl. 10.30 verður møti við Pola Jacobsen. Vegna møtirøðina hjá Karisma í Læraraskúlahøllini í Havn verður onki opið hús leygarkvøldið og onki evangeliskt møti sunnukvøldið. Mánadagin kl. 17 møta »Liljurnar« – gentur 7-13 ár.

Soli Deo Gloria
Mánakvøldið kl. 20 bíblutími og bønarmøti. Mikukvøldið kl. 20 kvinnurnar samlast. Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti. Leygarkvøldið kl. 20 opið hús við Jónfinn. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 16.30 Alphaskeið (11-15 ár) møti er flutt til kl. 17, Jónfinn talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Møti kl. 20, Malmberg og Bodil Olsen tala. Kórið av Sandi syngur.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður í missiónshúsinum á Tvøroyri fríggjakvøldið kl. 21. Lív og Fía greiða frá hjálpararbeiði í Gambia. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Tom og Kára, kórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin í Vági
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Sámal, Gimma og Magnus. Mánakvøldið kl. 20 heimaforbundið.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 12.3.
kl. 9.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 10.15-12 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresufelagskapin
kl. 15 Ársfundur, val av trimum tiltaksliimum
kl. 16-18 Tilhaldið trý ára føðingardag – drekka og lagkøka. Speaker corner. Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491
Týsdagin 13.3.
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Eivør Pálsdóttir við manning syngja
Mikudagin 14.3.
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði (tilm. mánadag 316491)
kl. 14.30 Túrur. Várframsýning í Listaskálanum.
Hósdagin 15.3.
kl. 10.30-11 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát á 1. hædd
Fríggjadagin 16.3.
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn gongutúrur
Leygardagin 17. mars verður gongutúrur í Havn. Byrjað verður á Bilasavninum í Gráasteinsbrunninum kl. 15. Aftaná verður gingið heim í býin eftir sniðgøtum niðanfyri Landavegin. Tilmelding.

Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð hvørt mánakvøld á skrivstovuni á Bláa Krossi á Glyvrum, kl. 20-21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

Javni N. Finsensgøta 32
Skrivstovan er á Hoydalsveg 40, 3. hædd (ovast)
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl. 10-14
Fríggjadag kl. 13-16
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail:
javni@post.olivant.fo

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail:
gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin:
Tlf. 310237 týsdag frá kl. 10-12.
Ungdómsumboð:
Sára, tlf. 373106.
E-mail:
sara@post.olivant.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

FILMSTEIGURIN

What Women want



Nick Marshall er ein rættur maður. Ein sjarmerandi, ókúgaður brundur, sum livir lívið millum tey frægastu í samfelagnum. Hann elskar at lurta eftir Sinatra og heldur sjálvur, at hann hevur kekk upp á alt – ikki minst konufólk…

Men so eitt kvøldið heima í dreymaíbúðini missir hann takið, tá hann í einum óhappi í baðirúminum fær ein elektriskan stoyt, sum letur eygu og oyru hansara upp fyri meira, enn hann í sínum villasta fantasii kundi ímyndað sær. Nú hevur Nick Marshall, tann stóri reklamubossurin og stórsjarmørur, brádliga fingið nýggjar gávur. Hann uppdagar nú, at hann kann hoyra teir innastu tankarnir hjá øllum kvinnum, sum hann kemur í samband við.

Mel Gibson og Helen Hunt hava høvuðsleiklutirnar í romantiska filminum hjá Nancy Meyers, What Women Want, sum verður at síggja í Havnar Bio í kvøld.

Nick veit ikki rættuliga, hvat hann skal gera við nýggju gávur sínar. Fyri fyrstu ferð í lívinum veit hann hvørki út ella inn. Hann verður skelkaður av at finna út av, at hann ikki bara ikki er guds gáva til kvinnuna, men at eisini flestu kvinnur, sum hann kennir, halda hann vera eina klovn.

Men sum frá líður fatar Nick, at hann kann gera sær dælt av nýggju gávunum – bæði privat og professionelt. Og hvør er betri offur ennDarcy McGuire, hansara vakria, dugnaliga og álitisfulli nýggi sjefur? Helen Hunt hevur hendan leiklutin.

Í eini roynd at tryggja reklamuvirkinum nakrar av kundunum frá stóra kvinnumarknaðinum, verður Darcy sett, sum nýggjur kreativur leiðari… eitt starv, sum Nick heldur átti at verið hansara. Nick er langt frá glaður fyri at skula arbeiða við síðuna av hesi nýggju dámuni, hóast hon hevur tekkilig bein.

So Nick ger av, at hann nú skal hann gera sær dælt av nýggju gávunum til at lesa tankar hennara, so hann kann hála teppið undan henni á tann hátt og tryggja sær starvið.

Men Darcy er ikki so løtt at kúga. Hun veit, hvat orð Nick hevur á sær, at hann er mannchauvinistur og at hann hevur ein stjørnustatus í firmanum.

Nick og Darcy gerast kortini væl. Okkurt er við at henda, og tey royna at stýra kenslunum, bæði professionelt og romantiskt.

Nick hevur altíð gjørt reklamur, sum venda sær til menn – øl, ítróttur og gentur í bikini. Og aftan á arbeiðstíð royndi at eftir somu bikinigentum við síni sjarmu. Kortini skilir hann als ikki kvinnuna.

Men alt broytist, tá hann brádliga hoyrir innastu tankar kvinnurnar. Tá hann ger sær dælt av nýggju gávunum, mennist hann. Hugsa tær! At kunna hoyra alt, kvinnan hugsar…!





Frumsýning

Fríggjadagin	16.03.	kl. 20[00]		Fríggjadagin	16.03.	kl. 23[15]	
Leygardagin	17.03.	kl. 20[00]		Leygardagin	17.03.	kl. 23[15]	
Sunnudagin	18.03.	kl. 19[00]		Sunnudagin	18.03.	kl. 22[15]	

www.in.fo/havnarbio

HAVNAR BIO
Tlf. 311956

10 OSCAR NOMINERINGER

Fríggjadagin 16.03. kl. 20[00] Leygardagin 17.03. kl. 20[00]
Sunnudagin 18.03. kl. 20[00]

OSCAR NOMINERINGER

Fríggjadagin 16.03. kl. 22[30] Leygardagin 17.03. kl. 22[30]
Sunnudagin 18.03. kl. 22[30]

Fríggjadagin 16.03. kl. 18[00] Leygardagin 17.03. kl. 18[00]
Sunnudagin 18.03. kl. 17[15]

KOMANDI FILMAR

Frumsýning Fríggjadagin 23.03.



Frumsýning Fríggjadagin 23.03.